# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Solveig Isfeldt 70 ár

Í dag, 3. oktober, verður havnarkvinnan Solveig Isfeldt 70 ár.

Tað, sum flestu fólk kenna Solveig fyri, er hennara arbeiði við føroyskari ull og sum fólkaskúlalærara.

Hon hevur verið við til at skapa nýggjan áhuga fyri tí gamla handverkinum at arbeiða við ull. Hon hevur arbeitt við ullini á øllum stigum, frá tí at ullin var á seyðinum til troyggjan var bundin, teppið vovið, vesturin vovin v.m. Hon hevur karðað, spunnið, tøvt, vovið, bundið og litað ullina sjálv. Harafturat hevur hon barkað roðið til ymisk endamál.

Tey nærmastu kenna hana fyri hennara tolna sinnalag, ágrýtni, hjálpsemi, arbeiðssemi, engagement og skemtingarsama lyndi.

Solveig varð fødd í Keypmannahavn í 1937. Mamman, Gertrud Jørgensen, var donsk og pápin, Absalon Eysturoy, var føroyingur. Hon var nr. tvey í røðini av fimm systkjum. Familjan flutti heim til Føroyar beint aftan á seinna heimsbardaga. 18 ára gomul átti hon sítt fyrsta barn og 27-ára gomul áttu hon og maðurin fýra børn. Maðurin, Gudmund / Mynde, silgdi í útlondum í nøkur ár, og hon var tá einsamøll um alt húsarhaldið og børnini, sum hjá so nógvum føroyskum kvinnum. Og hetta kláraði hon væl við sínum tolna sinnalagi.

Í tíðini, tá ið hon ansaði eftir sínum smáu børnum í heiminum, fekst hon altíð við okkurt handarbeiði, serliga seyming, sum hon er køn í. Hon hevði gingið á ymiskum seymiskeiðum at



læra seg meira um hetta handverk. Í 1979 tók hon læraraprógv í Havn. Síðan arbeiddi hon sum fólkaskúlalærari í Tórshavnar Kommunuskúla. Harumframt undirvísti hon m.a. í kvøldskúlanum í at tøva ull. Umframt hetta undirvísti hon eitt skifti vaksnum í vaksnapedagogikki. Handarbeiðið var eitt av hennara best umtóktu áhugamálum, og í 1994 tók hon exam. pæd. útbúgving innan handarbeiði á Danmarkar Lærarháskúla.

Árið 2004 kom til at broyta lívið hjá Solveig munandi. Aftaná næstan 45 ára hjúnalag við manninum, Gudmund, fórst hann við báti sínum í Nólsoyarfirði ein kaldan illveðursdag tann 7. januar. Aftaná stórt leitararbeiði bæði á sjógvi og á landi, varð hann funnin aftur út fyri Sumbiarbygd nýggju dagar eftir. Seinni sama árið komu enn eini skelkandi boð um bráðliga íkomna álvarsliga sjúku hjá soninum, Dávur, sum andaðist gott eitt døgn seinni. Og hereftir gekk bert eitt ár, so andaðist beiggi hennara, Henning Eysturoy. Alt hetta ávirkaði lív hennara nógv. Lívið helt tó áfram, men bleiv øðrvísi enn tað hevði verið fyrr, nú tann nærmasta familjan var minkað munandi innan fyri eitt so stutt tíðarskeið. Men hon settist tó ongantíð heilt aftur og arbeiddi seg spakuliga upp aftur.

Í dag er Solveig við sínum sjeyti árum framvegis ein virkin kvinna í heimi sínum, har hon fæst við mangt og hvat. Hon torir framvegis at royna nýggjar leiðir, har hon m.a. fæst við nýmótans tøkni uttan teir stóru trupulleikarnir. Umframt hetta er hon framvegis virkin innan fyri Felagið fyri Hoyribrek og er nevndarlimur í Sjúkrakassanum.

Við hesum vil eg ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum og ein góðan byr tey komandi árini.

**Dóttur tín, Gunhild**

## Eitt lítið eftirmæli um Hans Andrias Olsen, Árnafjørð

Tey sjeyti ár er vár jarðarleið í stoltasta stríð og møði um áttati aldur ein kappi beið - alt sárkaðist ellisfrøði.

Ein rættur sjógarpur er farin, var sítt mesta lív á sjónum, var formaður á fleiri bátum, var serliga gløggur skilamaður, tók skiparaprógv við besta karakter. Settist í búgv í Árnafirði, ein møtimaður av Guds náði, reisti runt til møtir, var eisini deknur fleiri ár í heimbygdini.

So kom sjúkan sum ein trúgvur fylgisveinur og var Dia nú til seinast á »Sambýlinum Heygnum«. Vit sakna teg, men unna tær hvíluna heima hjá Gudi. Við hjartaligari samkenslu til øll tíni kæru, æra verið títt minni.

**Nicolina og Torleif**

*Statt stinnur og sterkur um ódnin er hørð*
*lat síggjast at íðin tú framm eftir rør*
*lat mót ikki falla, legg megina til*
*tí framm kemur hann sum í álvara vil.*

*Nú Dia er farin, ein rødd tagnað er*
*so íðin at boða Guds æru tú ger.*
*Tín fjørður er rógvin, tú komin er heim*
*og møtir har Jesus í gleði og gleim.*

*Tað tí tú her livdi á foldini her*
*Guds orð tú fortaldi og boðskapin ber.*
*So øll máttu lurta, sum tá lýddu á*
*um Gud sum teg elskar, eg siga kann frá.*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Leivur Clementsen** andaðist á Sambýlinum á Skerinum týsdagin 95 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Saloma fuglø úr Hvalvík**, andaðist í gjár 96 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Helena Hansen**
Haldórsvík

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni seinasta teinin.

*Familjunnar vegna*
**Mary, Majken, Henny, Kirstin, Halgerð, Jónhilda og Jonhard**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálp við deyða og jarðarferð hjá, okkara góða pápa, verpápa, abba og langabba

**Klæmint Nicodemussen**
Sandur

*Familjunnar vegna*
**Edvard, Niels og Birgir**

**Dagurin**
**4. oktober er nevndur eftir Franciscus**, sum doyði í 1226. Eisini kendur sum Sankta Frans av Assisi. Sankta Frans skúli í Havn - eisini kendur sum Nonnuskúlin, er nevndur eftir honum, og har verður dagurin hildin á hvørjum ári.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!